

*Vibratiónsvognarnir eru komnir til Lopra. Teir hava seinastu dagarnar arbeitt við vognunum, sum hava til endamál at senda vibratiónir niður í undirgrundina. Mynd Áki*

## *Boringin í Lopra nærkast endanum:*

# Skotið seismikk á sjálvum boriøkinum

*Í vikuni fór boringin í Lopra inn í eina sera týðandi fasu. Skotið varð við luftkanónum í einum vatnkari á boriplássinum og varð eisini arbeitt frá tveimum framkomnum vibratiónsvognum. Nú verður so borað nakað aftrat. Væntandi verður boringin liðug mánadagin. Úrslitið av boringini er, at tað eru fingnir nógvir týðandi upplýsingar til vega. Men har er hvørki funnin olja ella gass vilja tíðindi vera við. Tað var so heldur ikki endamálið við boringini.*

JAN MULLER

-Vit skulu bora eitt sindur aftrat fyri at kunna taka eina endaliga kjarnu upp. Sostatt eru vit í ferð við at leggja seinastu hond á arbeiðið í holinum.

Hetta sigur Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas. Hesar mánaðirnar boringin hevur vart hevur hann verið talsmaður hjá teimum 19 oljufeløgunum mótvegis fjølmiðlunum og harvið almenninginum.

Tað hevur rættuliga verið nógv virksemi á boripláss-inum í Lopra hesar seinastu dagarnar. Tá komið var niður á góðar 3500 metrar varð gjørt av at gevast við boringini fyri at fara undir tær mongu mátingarnar og kanningarnar í holinum og økinum har nærhendis.

Í vikuni kom nógv sera framkomin mátiútgerð til Lopra við Smyrli og harímillum eisini tveir stórir vibratiónsvognar. Hetta er tað teir brúka til seismiskar kanningar á landi og sum kann samanberast við tann seismikk, sum verður skotin á sjónum. Her brúkar tú bara vibratiónir ístaðin fyri luftkanónir.

Arne Rosenkrands Larsen sigur, at teir gjørdu av ikki at skjóta seismikk á Lopransfirði hesaferð av ótta fyri, at hetta kundi skaða alifiskin á fjørðinum.

Ístaðin vórðu boð send eftir tveimum serútgjørdum vibratiónsvognum, sum síðani hava staðið ov vibrerað í einar tveir dagar. Teir skuldu so fara aftur til Aberdeen í dag.

Teir hava so eisini skotið við luftkanónum í einum stórum vatnkari á boriplássinum fyri harvið at fáa optimalt burtur úr. Arne Rosenkrands sigur, at teir við hesi útgerðini hava fingið minst líka nógv burtur úr um ikki meira, enn um teir skutu vanligan seismikk frá skipi á fjørðinum.

**Nøgdir**

-Vit hava fingið tað, sum vit kundu fáa av upplýsingum. Vit vita tað, sum vit skulu, og tí er heldur eingin orsøk til at bora nógv longur niður, sigur Arne Rosenkrands Larsen.

Hann heldur tað er orsøk til at vera nøgdur við úrslitið av boringini men hann kann ikki upplýsa nakað í smálutum.

*-Men tá eitt av endamálunum við boringini var at koma gjøgnum basaltið og tit í dag siga tykkum vera komnar á mál, merkir tað so ikki, at tit eru komnir niður gjøgnum basaltfláirnar?*

-Tað kann eg framvegis ikki siga nakað um.

*-Men um tit ikki vóru komnir gjøgnum basaltið so høvdu tit neyvan verið so fegnir?*

-Tað kann vera at tit hava rætt í tí.

*-Og eru tit komnir gjøgnum basalt, so eru tit væl eisini komnir í onnur løg, sum møguliga eru av slíkum slag, at tey kunnu goyma olju og gass!*

-Fyri okkum er tað av týdningi at fáa nýggjar upplýsingar um undirgrundina, næstan líka mikið hvat slag av vitan talan er um.

Arne Rosenkrands Larsen vísir á, at tað er sera torført hjá teimum at siga nakað um, hví teir eru nøgdir við ta nýggju vitanina, og tí má tað vera ein spurningur um giting, tá fjølmiðlarnir skriva um hetta.

Hann vísir á, at oljufeløgini hava rindað 40 mill. kr. fyri hesa boringina og ein fortreyt fyri tí var nettup tann, at onnur oljufeløg ikki skuldu fáa lut í upplýsingum.

Vit spurdu um nakað er, sum týðir uppá, at vitanin frá Lopransboringini ger tað áhugavert at fara undir at bora frá landi eftir olju og gass!

-Um gjørt verður av at fara undir víðari kanningar á landi, so vil slík boring sjálvandi hava áhuga. Tað vil sjálvandi vera eitt element í hesi boringini at meta um, um tað kann løna seg at bora á landi.

**Koyra sement í holið**

Nú tað verður gjørt klárt til at rigga av í Lopra, so verður møguliga borað nakað aftrat, møguliga til mánadagin. Tá verður so farið at koyra sement í holið og annars rigga av.

Tá slík boring er liðug er tað vanlig mannagongd, at holið verður typt aftur. Uppgávan í holinum er liðug. Arne Rosenkrands Larsen sigur, at skuldi tað seinni komið hartil – hvat ongar ætlanir eru um í løtuni – at menn vilja bora longur niður við tí fyri eygað at bora eftir olju og gassi, tá vil eitt slíkt hol vera ov lítið í diametur. Tá verður tí rættari at bora eitt heilt nýtt hol og møguliga á øðrum staði eisini.

Nú verða so teir mongu upplýsingarnir sendir av landinum til ýmsar rannsóknarstovur kring allan heim at verða viðgjørdir og tulkaðir.

Roknað verður við, at hetta arbeiðið verður liðugt um eitt hálvt ár ella so. Mett verður at teir hava eitt úrslit í mars mánað.

Neyvan verður nakað upplýst fyri almenninginum heldur tá, men føroyskir myndugleikar hava kortini atgongd til allar upplýsingarnar. Hetta er ein partur av avtaluni. Upplýsingarnir kunnu tó í mesta lagi haldast loyniligir í fimm ár.

Arne Rosenkrands Larsen sigur annars, at hetta hevur verið ein sera spennandi og stór avbjóðing fyri teir.

Hann vísir á, at vit við hesi boringini eru vorðin klókari, tá tað snýr seg um føroysku undirgrundina. Talan er í hvussu er um týðandi upplýsingar, sum eru fingnir til vega.

*Arne Rosenkrands Larsen frá Dopas, Lars Bruvold frá Danop og Lise Lotte Kierkebø frá GEUS, tá fyrireikingarnar vórðu gjørdar til Lopransboringina. Mynd Kalmar*

